Skála–B68 0–1 (0–0):

Tað koppaði úteftir á Skála

Tá ið tað reið um snarið, vóru tað gestirnir av Toftum, sum fóru við øllum av Skála, har heimaliðið nú hevur spælt í 270 minuttir uttan at skjóta mál

SKÁLA–B68
Jóannes Hansen

Tríggjar dystir, einki stig og málmunin 1–5. Tað er úrtøkan hjá skálamonnum. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir hava spælt í tríggjar ferðir 90 minuttir, uttan at teir hava megnað at skora mál. Einasta málið, sum teir hava fingið, sygrdi GÍ fyri mikukvøldið.

Í heimadystinum ímóti B68 hevði Skála enn eina ferð fleiri innlegg, uttan at tey nógvu vóru serliga vandamikil. Albert Sævarsson í B68 málinum er stinnur í luftini, og ta einu ferðina, tá ið skálamenn vóru rættuliga vandamiklir, stórbjargaði íslendski málverjin og vísti harvið, hvussu sera týdningarmikið tað er hjá einum liði at hava ein klassamálverja. Tólv minuttir vóru farnir av seinna umfarinum, tá ið Hanus Thorleifsson slapp til baklinjuna í høgru, hann spældi skrátt út frá til Jónhard Frederiksberg, sum úr átta metra fjarstøðu fekk tamarhald á bóltinum og smekkaði til. Men B68 málverjin bjargaði ógvuliga væl, og harvið var størsti heima møguleikin farin.

Sigursmálið fekk B68, tá ið tað restaðu tíggju minuttir. Fróði Benjaminsen, sum eitt vet til vinstru og við stórari ferð kom í brotsteigin, spældi eitt tvey við Súna Fríða Johannesen, og tá ið mótstøðumaður royndi at takla og nært við beinini hjá landsliðsmanninum, so lá hann flatur. Jens Petur Brattalíð peikaði á ellivu metra blettin, eingin hevði orsøk at mótmæla, og Dánial Hansen var púra kaldur, tá ið hann við innaru síðuni trillaði bóltin í mótsatta borði av tí, sum Eugen Voda tveitti seg.

Uppstillingin eftir manningini

Tey seinastu árini eru alt fleiri lið farin frá trimum miðverjum og við dýpd í og til at spæla við fýra spælarum í flatari verju. Ofta tykist hugburðurin vera, at tað gera stóru liðini í sjónvarpinum, og so er tað in.

Eingin ivi er í, at fløt verja við fýra spælarum hevur betri fyritreytir fyri fleiri møguleikum í sjálvum spælinum við sær. Men tað eigur altíð at vera soleiðis, at spælskipingin verður løgd eftir fólkinum, sum er tókt. Soleiðis tykist tað ikki altíð at vera.

Í fjør royndi B68 sum oftast við flatari verju, og tað hava teir eisini gjørt í steypakappingini og í fyrsta umfarinum í landskappingini. Á Skála var Arnbjørn Danielsen við fyri fyrstu ferð, og venjarin valdi 3–5–2 spælskipanina. Hans Fróði Hansen var aftastur, og tað sást væl á avrikinum hjá honum – serliga í 1. hálvleiki – at hann ikki var heilt uppi á dubbunum. Tvær ella tríggjar ferðir var um uppi í kiksaðum uppspæli, sum bar næstan møguleikar við sær til lættbeintu Jónhard Frederiksberg og Alexandur Johansen. Dánial Hansen og Arnbjørn Danielsen vóru tryggir eftiransarar, og í 2. hálvleiki, tá ið Skála fyrstu løtuna hevði takið, riggaði B68 miðverjan væl.

Hjá B68 hevði álopsspælið lyndi til at detta í vinstra borð. Øssur Hansen var á miðvøllinum og hevði nógv meiri sentralan leiklut, enn hann hevur havt. Hann og Fróði Benjaminsen stóðu sterkir í myndini, meðan yngru framrættaðu menninir hesa ferð høvdu torførari við at blanda seg uppí.

Punkteraðu seg sjálvar

Undan steðginum reið tað støðugt um snarið. Bæði liðini vístu vilja, men ov ofta stóðust spentar støður av kiksaðum uppspæli og snarligum mótálopum, tá ið verjurnar ferð eftir ferð vóru um reppið at verða yvirspældar.

Eftir steðgin hevði Skála hug at trýsta, uttan at teir vórðu serliga vandamiklir, og uttan at miðvallarspælið hesa ferð hekk so væl saman, sum tað hevur gjørt undanfarnu ferðirnar. Tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, fekk Alexandur Johansen reytt kort fyri hevnisøku ímóti Fróða Benjaminsen, sum hevði gjørt fríspark til gult kort ímóti honum. Tá tóktist møguleikin hjá Skála at vinna so við og við at hvørva. B68 gjørdist vandamikið, og so eydnaðist teimum at fáa sigursmálið í uppgerð, sum hvat upplløgdum málmøguleikum viðvíkur annars kundi havt endað málleys.

Skála–B68 0–1 (0–0)
0–1: Dánial Hansen 80.
Dómari: Jens Petur Brattalíð
Skála: Eugen Voda – Agnar Højgaard (Rói Jacobsen, 85.), Pauli G. Hansen, Dusan Jaic, Arnhold Berg – Hanus Thorleifsson (Pétur Geir Svavarsson, 77.), Alexander Jovevic, Sveinur Justinussen, Bogi Gregersen — Jónhard Frederiksberg, Alexandur Johansen
Gult kort: Agnar Højgaard
Reytt kort: Alexandur Johansen 69.
B68: Albert Sævarsson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen – Jóhan Petur Poulsen (Bogi Petersen, 77.), Fróði Benjaminsen, Jan Ingi Petersen, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Johannesen, Kristian Anton Andreassen (John Heri Dam, 61.)
Gult kort: Jóhan Petur Poulsen, Fróði Benjaminsen

Todi trýstir FCK

Eftir at føroyski álopsspælarin við sigursmálinum ímóti FCM hevði tryggjað FCK oddasessin, legði Todi Jónsson trýst á FCK leiðlsuna við at endurtaka, at hann fegin vil halda fram í felagnum

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Við avgerandi málinum ímóti FCM setti Todi enn einaferð eina striku undir týdning sín fyri gullvónirnar hjá FCK

Gongst tað, sum tað er skrivað, og verður Todi Jónsson bara ein stóran mánað afturat í FCK. Um tað gongst, sum Todi Jónsson ynskir, so fer hann at halda fram í felagnum. Tað staðfesti føroyska álopsessið hjá FCK aftur leygardagin, tá ið hann var stóri gloypibitin hjá pressuni, tí hann sera hegnisliga hevði skorað sigursmálið hjá FCK og harvið hevði tryggjað felagi sínum oddasessin.

– Einki er avgjørt um, hvar eg fari at spæla eftir summarsteðgin. Men tað skal ikki vera nøkur loyna, at eg fegin vil halda fram í FCK, sigur Todi Jónsson, sum harvið leggur stórt trýst á FCK leiðsluna um at boyggja seg og í orðsins sanna týdningi at seta rætta prísin á málmaskinuna, sum Todi í vár hevur víst FCK leiðsluni og áskoðarunum, sum halda so nógv av honum, at hann er.

Niels–Christian Holmstrøm og Flemming Østergaard sótu á Ikast stadion, og tað hevði ivaleyst passað teimum nógv betri, um onkur annar av hinum tíggju FCK spælarunum – og ikki Todi Jónsson – hevði skorað. Men enn eina ferð fingu teir staðfest, at Todi er gull verdur fyri FCK. Hóast hann hevur spælt sera lítið og aftur hesa ferð var á beinkinum, so hevur hann í fimm dystum skorað fýra mál, og nú er hann toppskjútti hjá FCK í superliguni.

2–1 sigursmálið skoraði Todi minni enn ein minutt eftir, at hann eitt lítið korter undan leikloki endiliga slapp upp í part. Liðformaðurin, Peter Nielsen, stakk eftir miðásinum til Toda, sum røttu megin rangstøðumarkið fekk bóltin við sær, streyk frá miðverjuni og var ósvikaliga tryggur, tá ið hann stóð andlit til andlit við landsliðsmálverjan Peter Skov Jensen.

Sigurin hevði við sær, at FCK leygarkvøldið var nýtt oddalið í superliguni. Teir varðveittu sessin sunnudagin, tá ið Brøndby við Jón Róa Jacobsen á beinkinum allar 90 minuttirnar ikki megnaði meiri enn 0–0 á heimavølli ímóti AB. Hetta var fyrstu ferð í 45 dystum, at Brøndby ikki fekk mál. Størsta heiðurin fyri tað átti U–21 landsliðsmálverjin í AB málinum, Stephen Andersen. Hann var ein sannur brandur. Danska pressan staðfestir, at Brøndby tvær ferðir í fjúrtan dagar ikki hevur megnað at hildið tørn um oddasessin, og at tað harvið tykist sum um ungu menninir fáa gummibein, tá ið teir skulu vísa, at teir eru broyttir frá at vera dreingir og til at vera menn.

Tað resta fýra umfør, og sum tað sær út í løtuni, so verður talan um sanna finalu, tá ið FCK í næstsíðsta umfarinum, mikukvøldið 18. juni, fer at vitja í Brøndby.

Farum tapti fyri triðju ferð á rað, og nú rillar bronsuplássið. Esbjerg vann 3–2 í Farum, og esbjergensarnir løgdu seg harvið undir liðini á FCM á fjórða plássi, bara tvey stig aftanfyri Farum.

OB leigaði undan kappingarbyrjan Steffen Højer úr Viborg, har teir ikki hildu seg hava brúk fyri álopsmanninum. Tað iðra teir seg ivaleyst um nú. OB vann 3–1 í Odense, og Steffen Højer skoraði í 1. hálvleiki tvey mál!

Botnurin tættur

Sunnudagin varð mest sum greitt, at Herfølge næsta kappingarár verður einasta umboðið úr Køge kommunu í superliguni. Køge tapti 4–1 á heimavølli ímóti AGF. Í átta dystum hevur Køge bara fingið eitt stig, meðan hetta var fyrsta ferðin síðani 1999, at AGF hevur spælt fimm ferðir á rað uttan at tapa. Nú er stórfelagið í Árhus fýra stig frá niðurflytingarstrikuni.

Silkeborg er dygst niðanfyri og AaB dygst omanfyri strikuna. Tí var talan um lykladyst, tá ið hesi bæði liðini hittust í Silkeborg. Hvørgin parturin vildi tapa, og so endaði tað málleyst. Seks feløg eru framvegis í niðurflytingarvanda. Tvey feløg telvast um gullið, og hini stríðast um bronsumerkini og UEFA Cup pláss. Harvið hava øll okkurt at spæla fyri í fýra teimum síðstu umførunum.

Magni á Lakjuni var dagsins maður í Gundadali sunnudagin, men hesa ferð mundu tað neyvan vera B36-áskoðararnir, sum góvu honum hendan heiðurin

B36-EB/Streymur 1-3 (1-1):

Favorittar á knøunum

Longu undan kappingini varð B36 rópt til stóra FM-favorittin, men eftir tveir dystir er bert eitt stig á kontini, og tapið fyri EB/Streymi sunnudagin mundi svíða meira enn gott er

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

EB/Streymur hevur longu fleiri ferðir í ár givið tekin um, at liðið veruliga skal takast í álvara í ár.

Í bólkaspælinum í steypakappingini var liðið ósigrað á fyrsta plássinum, og tó at tað her gjørdist til eitt farvæl í dystinum móti B36, so var tað í stóran mun tilvildin, sum gjørdi, at so var.

Skapti lítið

TÍ vóru teir í B36 í øllum førum ávaraðir undan heimadystinum sunnudagin, og tað er nokk einki at ivast í, at teir í øllum førum ikki tóku serliga lætt upp á uppgávuna. Sum fremsti gullfavoritturin vóru ráðini hjá B36 til nakran stigamiss heldur ikki serliga stór eftir málleysa javnleikin í fyrsta umfarinum, men tað skuldi tó ikki ganga lang tíð, áðrenn EB/Streymur hevði boðað frá, at her var kanska okkurt í væntu.

Magni á Lakjuni, sum saman við fleiri liðfeløgunum, hevur havt sína dagliga gongd í B36-húsinum nøkur ár, fekk bóltin. Staddur við brotsteigarhornið royndi hann seg við skoti, sum at síggja til ikki var serliga vandamikið, men onkursvegna fekk Tróndur Vatnhamar als ikki hildið skotinum, sum ístaðin smoygdi sær inn í meskarnar.

Hetta gjørdist startskotið til eitt hampuliga stórt trýst frá heimaliðnum. Gestirnir tóku seg kanska eisini nakað longur aftur á vøllin, fyri síðani at dúva upp á mótálop, men tað var heimaliðið, sum setti kósina.

Hetta førdi eisini nakrar vandastøður við sær, men veruligar opnar málmøguleikar gjørdist talan tó ikki um. Gunnar á Steig hevði tað sum so ógvuliga friðarligt í EB/Streym-málinum, men brádliga var kortini javnvág í. John Petersen sendi bóltin innfyri, og tá Andrzej Pacek skuldi toyggja seg eftir bóltinum, var hann somikið óheppin at beina bóltin í egið mál.

Hildu allan vegin

Við sálarligu barlastini, sum útjavnandi málið átti at givið, skuldi setningurin hjá B36 í seinna hálvleiki verið greiður. Men tað gekk ikki long tíð, áðrenn gestirnir aftur høvdu sett kílar í.

Fríspark varð dømt nakað uttan fyri brotsteigin, og eftir eitt sindur av tosið varð gjørt av, at hesum skuldi Magni á Lakjuni taka sær av. Skotið var kanska ikki av teimum harðastu, men bólturin smeyg sær upp um múrin, og meðan Tróndur Vatnhamar bert kundi hyggja at, dalaði bólturin hegnisliga niður í nærmasta málhorn.

Hetta gav aftur gestunum høvi at spæla vanliga kontraspælið, og tað var eisini hetta, sum teir nú løgdu seg eftir. Teir lótu heimaliðið hava bóltin stóran part av tíðini, men hóast dúgliga varð roynt, so megnaði B36 ongan tíð at spæla seg ígjognum væl skipaða verjupartin.

Og sjey minuttir fyri leiklok fall so endaliga avgerðin. EB/Streymur hevði í fleiri førum havt upptrekk til kontra-møguleikar, og hesa ferð varð Sorin Anghel sendir avstad. Hann var mest sum leysur, men tá tveir havnarmenn vóru um at renna hann upp, steðgaði hann brádliga á. Tók eitt lítið trekk og høgdi so bóltin í kassan av brotsteigarmarkinum, og so var leyst og liðugt.

Nýggjar støður

Við sigrinum hevur EB/Streymur togað seg upp millum ovaru liðini á stigatalvuni, og hóast góðu steypaavrikini, so vóru tað helst mong, sum framvegis settu spurnartekin við liðið.

Hvussu tað fer at hylnast í longdini, kann so heldur ikki staðfestast enn, men tað tykist í øllum førum so, at liðið í ár er tað sterkasta, sum nakran tíð hevur átt heimavøll á Eiði. Ikki minst tí breiddin á liðnum nú tykist vera væl størri, enn hon aloftast hevur verið.

Hjá B36 stendur hinvegin nakað verri til. Liðið varð longu undan kappingini rópt til mest sum vísir føroyameistarar, men eitt stig av seks møguligum benda í øllum førum ikki tann vegin. Sjálvandi kann framvegis nógv henda, og enn eru 48 stig at spæla um, so avskrivast skala árstalsfelagið neyvan. Men tað er einki at ivast í, at trýstið nú liggur á liðnum. Komandi vikuna skulu teir tvær ferðir í Eysturoynna, og um ikki dystirnir móti B68 og Skála geva nakað, sum líkist seks stigum av sær, er einki at ivast í, at tolið hjá mongu viðhaldsfólkunum er um at vera uppi.

Dysturin í tølum

B36-EB/Streymur 1-3 (1-1)
0-1: Magni á Lakjuni
1-1: sjálvmál
1-2: Magni á Lakjuni
1-3: Sorin Anghel
B36: Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Fróði Clementsen, Rúni Elttør – Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras, Julian Johnsson, Heðin á Lakjuni – John Petersen, Jákup á Borg
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Bárður OIsen, Egil á Bø, Andrzej Pacek, Esmar Eiðisgarð - Marni Djurhuus, Ronie Samuelsen, Marek Wierzbicki, Magni á Lakjuni – Hans Pauli Samuelsen, Sorin Anghel

1. deild menn

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	GÍ	3	2	0	1	4	3	1	6
2	EB/Streymur	2	1	1	0	5	3	2	4
3	HB	2	1	1	0	5	3	2	4
4	NSÍ	2	1	1	0	4	2	2	4
5	KÍ	2	1	1	0	3	2	1	4
6	B68	2	1	1	0	3	2	1	4
7	VB	2	0	2	0	2	2	0	2
8	B36	2	0	1	1	1	3	-2	1
9	FS V	2	0	0	2	2	5	-3	0
10	Skála	3	0	0	3	1	5	-4	0

Danska superligan

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FCK	29	15	8	6	45	30	15	53
2	Brøndby (M)	29	14	10	5	53	29	24	52
3	Farum	29	14	2	13	43	52	-9	44
4	FCM	29	11	9	9	44	36	8	42
5	Esbjerg	29	11	9	9	60	54	6	42
6	OB (S)	29	10	11	8	48	41	7	41
7	AGF	29	10	7	12	44	51	-7	37
8	Viborg	29	9	9	11	48	50	-2	36
9	AB	29	8	11	10	34	40	-6	35
10	AaB	29	10	4	15	36	44	-8	34
11	Silkeborg	29	8	9	12	42	41	1	33
12	Køge	29	8	3	18	41	70	-29	27

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Herfølge	27	20	3	4	67	34	33	63
2	Frem	27	17	4	6	58	35	23	55
3	Fredericia	27	13	8	6	46	24	22	47
4	Randers F.	27	14	4	9	58	45	13	46
5	Vejle	27	13	4	10	57	54	3	43
6	HFK Sønderj.	27	11	8	8	55	48	7	41
7	Skjold	27	12	4	11	45	35	10	40
8	FC Aarhus	27	11	3	13	44	48	-4	36
9	Ølstykke	27	9	8	10	54	53	1	35
10	AC Horsens	27	9	7	11	43	46	-3	34
11	Brønshøj	27	9	5	13	40	48	-8	32
12	B 93	27	8	6	13	40	46	-6	30
13	Hvidovre	27	7	7	13	35	52	-17	28
14	B 1913	27	7	6	14	33	54	-21	27
15	B 1909	27	6	7	14	46	66	-20	25
16	HIK	27	5	6	16	35	65	-30	21

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)

Norska tippeligan

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Rosenborg	7	7	0	0	19	4	15	21
2	Sogndal	7	4	2	1	13	9	4	14
3	Viking	7	3	3	1	14	8	6	12
4	Odd Grenland	7	4	0	3	12	13	-1	12
5	Bodø/Glimt	6	2	3	1	9	7	2	9
6	Lyn	7	2	3	2	12	13	-1	9
7	Stabæk	6	2	2	2	8	6	2	8
8	Molde	6	2	2	2	8	7	1	8
9	Lillestrøm	7	2	2	3	6	12	-6	8
10	Bryne	6	2	0	4	9	11	-2	6
11	Vålerenga	7	1	3	3	8	11	-3	6
12	Brann	7	1	3	3	7	14	-7	6
13	Tromsø	7	1	2	4	12	17	-5	5
14	Aalesund	7	0	3	4	9	14	-5	3

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)